# í tøkum tíma



*Byggisáttmálin sigur, at høllin skal latast í september í ár. Men sjálvur væntar Jákup at tað verður nakað fyrri*
Mynd: Høgni Thomsen

**Tað er helst eingin onnur høll í landinum, sum hevur so góðar sømdir til tey rørslutarnaðu sum júst henda**

spentu badminton-spælarnir at royna seg á fyrsta sinni.

Við arbeiðsgongdini sum nú er, verður miðað eftir at høllin skal verða liðug um ólavsøkuleitið. Tó er ætlanin at hava hana opna nú á norðoyastevnu, soleiðis at fólk kunnu koma inn at eygleiða byggingina og fáa eina meting av, hvussu góðar umstøðurnar fara verða.

– Byggisáttmálin sigur kortini, at hon skal verða liðug 21. september – eitt ár aftaná at arbeiðið byrjaði.

– Men teir hava allatíðina satsað uppá, at hon skuldi verða liðug áðrenn tíðina. Og nú vænta vit, at tað fer at halda, sigur Jákup, ikki sørt spentur.

## Fleiri vøllir í einum

Nýggja badmintonhøllin í Klaksvík er útgjørd við øllum tí, sum krevst til eina slíka høll anno 2007.

Hinvegin er ikki bert ætlanin, at badminton skal spælast í høllini. Hon skal somuleiðis kunna hýsa mongum øðrum ítróttargreinum.

Hetta sær ein best, um hugt verður eftir sjálvum vøllinum

**Saman við áskoðaraplássunum á hinari síðuni og við balkongini meta vit, at eini 8-900 fólk – kanska heilt upp ímóti 1000 - sleppa inn her samstundis**

sum er 40 metur langur og 20 metur breiður: Her liggur fyrst ein hondbóltsvøllur, tí Team Klaksvík fer at halda til her.

Inni á vøllinum liggja haraftrat fimm badminton-vallir og tríggir vallir til flogbólt sum flogbóltsfelagið Mjølnir fer at gera brúk av.

Felags fyri hesi trý feløgini – Team Klaksvík, Badmintonfelagið og Mjølnir er – at tey ongatíð hava átt tak yvir høvdið. Saman við teimum er eisini felagið Treystið, ið tekst við frælsan ítrótt, við í ætlanini.

– Hesi feløgini hava altíð havt sera vánaligar umstøður. Men nú er hesin trupulleikin burtur, slær Jákup fast.

## Rørslutarnað vælkomin

Tað er tó ikki bert á sjálvum vøllinum, at feløgini í Klaksvík fáa betri umstøður. Umstøðurnar til arbeiðið í sjálvum felagnum verða eisini munandi betri.

Uppi á teirri einu balkongini eru gjørd høli til fýra skrivstovur. Hesar fara Treystið, Mjølnir, Norðoya Frítíðarráð og Badmintonfelagið at fáa nyttuna av. Eitt høli er somuleiðis gjørt til dómararnar.

Millum hesar skrivstovurnar er eitt innvik, har ætlanin er at skipa eina minni kaffistovu, har fólk kunnu keypa sær ein kaffimunn meðan dystir eru á vøllinum ella venjing er á skránni.

Tað sum kortini man gera hesa høllina til ta best egnaðu til øll fólk – rørsluførog rørslutarnað - er stóra lyftin í niðara endanum.

Henda lyftin fer at geva teimum rørslutarnaðu møguleikar at sleppa til allar dystir - og at síggja hesar dystir, bæði fram við sjálvum vøllinum, men eisini frá balkongini um áhugi er fyri tí.

– Tað er helst eingin onnur høll í landinum, sum hevur so góðar sømdir til tey rørslutarnaðu sum júst henda, sigur Jákup ikki sørt errin.



*Høllin kostar 15 mió kr., men teir munnu vera væl útgivnir, tí so stórur áhugi er longu fyri høllini*
Mynd: Høgni Thomsen